MERKISDAGAR



Brúdleyp

Leygardagin 3. august giftast Elsa Maria Dam og Erhard Pætursson Hansen.
Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 13.
Vælkomst verður í Meinigheitshúsinum í Havn frá kl 18. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, vera vinarliga biðin um at boða okkum frá áðrenn 20 juli á telefon 283790 ella 256134 ella við at senda okkum boð á facebook.




Brúdleyp

Beinta Hjelm og Kenneth Olesen verða vígd í Ebenezer, í Tórshavn tann 13. juli 2019 klokkan 13:00. Eftir vígsluna verður receptión í niðara sali - Øll eru hjartaliga vælkomin. Veitsla verður í Østrøm seinni á kvøldið fyri innbodnum.



Brúdleyp

Leygardagin 20 juli 2019 giftast Tina Berthelsen, Innan Glyvur og Magnus Remberg, Tórshavn.
Vígslan verður í Sjóvar kirkju kl. 12:00.
Veitslan verður fyri innbodnum í Dansifrøði kl. 18:00.




Brúdleyp

Leygardagin 10. august 2019 giftast vit bæði, Beinta Napoleonsdóttir úr Saltangará og Bárður S. Solmunde úr Søldarfirði.
Vígslan verður í Garðahúsinum í Søldarfirði kl. 13.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.00.



Brúdleyp

Hósdagin 25. juli 2019 giftast Kristina Iversen og Andy Souyave. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl.14:00. Veitsla verður fyri innbodnum í Østrøm. Brúðarhús verður fríggjadagin 26. juli á Íslandsvegi 19 frá kl.19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.



Brúdleyp

Leygardagin 13. Juli 2019 giftast
Helga Johannessen av Toftum og Absalon Esbern í Frammistovu av Kirkju.
Vígslan verður í Hvannasunds kirkju kl. 13.00
Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00



Brúdleyp.

Leygardagin 13. juli kl. 17 giftast Silja Aldudóttir úr Tórshavn og Ragnar Sigrunarson úr Sørvági. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

85 ár

Týsdagin 9. juli fyllir Malan Davidsen, Klaksvík, 85 ár. Malan er burturstødd føðingardagin

Gullbrúdleyp

Katrina og Gunnar Svartá 23 juli.
Silvurbrúdleyp
Súsanna og Eyðstein Wardum 06 august.
Vit hátíðarhalda dagarnar í bygdarhúsinum í Kollafirði, 17 august frá kl 14:00 til 20:00.
Tey ið vilja gleðast saman við okkum, hendan dagin, verða biðin um at siga frá áðrenn
07 august.
Vælkomin
Katrina Svartá tlf. 264031
Súsanna Wardum tlf. 273621

TILTØK

Gudstænastur

Leygardagin 13 juli kl. 11:00
G!Festivalurin
Festivalgudstænsta við altargongd í "Fjósinum" í Syðrugøtu. Theodor Eli Dam Olsen, prestur prædikar og kórið Eystanljóð syngur

Sunnudagur 14. juli 2019
Árnafjørður kl.11 Marjun Lómaklett
Argja kirkja kl. 11.00: Lestur.
Bønhúsið í Ørðavík kl. 11 Jónsvein Bech.
Christianskirkjan kl.11 Hans Eiler Hammer altarg.
Fámjins kirkja kl. 12 Jónsvein Bech.
Havnar kirkja kl. 11.00. Sonja Klein
Hoyvík kl. 11, Henning Bøgesvang
Kaldbak kl. 12, Theodor Eli Dam Olsen
Kunoy kl.12.15 Marjun Lómaklett
Kvívíkar kirkja kl. 12:00. Maria Jørðdal Niclasen
Oyndarfjarðar kirkja kl. 18: Símun Persson Jacobsen - altargongd
Selatraðar kirkja kl. 12: Símun Persson Jacobsen – altargongd
Sørvágs kirkja kl. 11.00. Marjun í Kálvalíð
Vesturkirkjan kl. 11.00: Bergur Debes Joensen. Altargongd

Sunnudagin 21. juli:
Havnar kirkja kl. 11.00 Ann D. Hansen – altargongd - skriftarmál kl. 10.40
Hoyvík kl. 11, Henning Bøgesvang
Kaldbak kl. 12, Bjarni Bæk
Nólsoyar kirkja kl. 12.00 Sonja Klein Altargongd

Ólavsøkuaftan 28. juli:
Havnar kirkja kl. 11.00 lestur
Hoyvík kl. 11, Henning Bøgesvang

Ólavsøkudag 29. juli 2019
Havnar kirkja kl.11.00 Jens Mortan Mortensen

Sunnudagin 4. august:
Havnar kirkja kl. 11.00 Ann D. Hansen
Hoyvík kl. 11, Henning Bøgesvang

Sunnudagin 11. august:
Havnar kirkja kl. 11.00 Sonja Klein
Hoyvík kl 11, Theodor Eli Dam Olsen
Kaldbak kl. 12, Hennung Bøgesvang

Sunnudagin 18. august
Havnar kirkja kl. 11.00 Sverri Steinhólm
Hoyvíkar kirkja kl. 11.00 Uni Næs dómpróstur skipar Bergtór H. Bjarkhamar í embæti í suðurstreymoyar norðara prestagjald .
Nólsoyar kirkja kl. 12.00 Sonja Klein

Sunnudagin 25. august
Havnar kirkja kl. 11.00 Uni Næs - altargongd - skriftarmál kl. 10.40

Adventistakirkjan
Leygardagin 13. juli 2019
Kl. 10 Bíbliugransking: Thorbjørn Brochs
Kl. 11
Sabbatsgudstænasta: DVD

KATÓLSKA KIRKJAN
Hvonn gerandisdag verður messa í Kerit kl. 17.30.
www.katolsk.fo

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Týsdagin 9. juli
kl. 19:30 Bøn og bíbliutími
Fríggjadagin 12. juli
kl. 21:00 Opið hús
Sunnudagin 14. juli
kl. 17:00 Møti, Maureen D. Clark talar
Veri hjartaliga vælkomin
www.glyvra.fo

Reyða Kross Vitjunartænasta
er nú eisini í hesum kommunum.
Um fólk vilja gerðast vitjunarvinir ella fáa vitjunarvin, kunnu tey ringja til viðkomandi kontaktpersónar.
Tórshavn
Eyrith tlf. 513784 ella Marin tlf. 284333
vitjunartanastan@redcross.fo
Sørvágs Kommuna, fyrisitari Anna.S. tlf. 332705/272142 Vága Kommuna, fyrisitari Hansia tlf. 229705 Tvøroyra Kommuna, fyrisitarir Marit tlf. 611087/281339 og Eileen tlf. 289563
og Bergljót tlf. 294216.
Kommununar í Sandoynni, fyrisitarir Óløf tlf.561348 og Kristbjørg tlf. 281708
Norðoya Øki, fyrisitarir Maria Olsen tlf. 282171 og Gerda Absalonsen tlf. 215174

LÝSINGARTORG

Arbeiði

Málara arbeiði
Vit átaka okkum alt uttandura málara arbeiði. Ring ella skriva til okkara á malarin.fo@hotmail.com og bið um eitt óbindandi tilboð.
253766

Býli í Føroyum

Íbúð ynskist
Ungt par við lítlum barni, um at vera heimleys. Vit roykja ikki, hava ikki húsdjór, og gjalda til tíðina. Alt hevur áhuga, men helst í/nær Tórshavn.
Tlf. 215353

in.fo
fyrst og fremst
www.in.fo

PROKLAMA

Øll, sum hava krøv í búnum eftir Heini Vesturdal, Brekkuvegur 8, 470 Eiði, føddur tann 18. oktober 1941, deyður tann 17. desember 2018, verða við hesum biðin um innan 6 mánaðar frá kunngerð av hesi lýsing at boða frá og skjalprógva krøv síni fyri undirritaða skiftirætti.

Tikið er ikki við skuld.

Krøv skulu gerast upp pr. deyðsdagin, og sendast til advokat Fríða Patursson, Frúutrøð 4, 100 Tórshavn, vísandi til sks.nr. 407/2018, saman við frumriti av teimum skjølum, sum krøvini eru grundað á.

FØROYA SKIFTIRÆTTUR,
tann 2. juli 2019